# Spælt urgu alt s

**URGULEIKARI** – Tá man hevur spælt orgul í 43 ár, so er ein sjálvandi í eini ávísari venjing. Men tað er kortini neyðugt at halda spælið viðlíka hvønn einasta dag, sigur 56 ára gamli Sigmund Rasmussen, ið virkar sum urguleikari við Oyndarfjarðar kirkju. - Tá eg eri í landi, spæli eg nógv heima við hús.



Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Tað er sunnudagur, og kirkjufólkið í Oyndarfirði ger seg klárt at fara til gudstænastuna.

Í dag er lestur á skránni, og ein av deknunum hevur fyrireikað seg frammanundan til dagsins lestur, og hevur haraftrat funnið fram til hóskandi sálmar.

Nakað undan gudstænastuni er Sigmund eisini til reiðar at fara oman í gomlu bygdarkirkjuna, sum um góð tvey ár kann hátíðarhalda 175 ára vígsludag sín.

Hann hevur fingið sálmarnar frá dekninum í hesum førinum, og ynskir líka at spæla teir einaferð ígjøgnum, áðrenn gudstænastan byrjar.

– Eftirhondini kenni eg teir flestu sálmarnar og tey flestu løgini. Men sjálvandi, er altíð gott líka at taka teir fram einaferð aftrat, sigur Sigmund Rasmussen.

Urgan hann spælir uppá, hevur fýra røddir og eina manual, og er "Made in Faroe Islands" – ein av mongum urgum hjá Verlandi Johansen í Havn. Men seinni í mánaðinum fær kirkjan eina elektroniska urgu við 28 røddum og tveimum manualum, og sum kemur allan vegin úr Pennsylvania í USA.

– Tað gleða vit okkum til, slær Sigmund fast.

## 13 ára gamal

Sigmund hevur sum longu nevnt spælt urgu síðani hann var ungur drongur. Tað var pápi hansara, Adolf Rasmussen sum tók sær av hesum týðandi arbeiðinum at læra sonin at spæla eftir nótum.

Tað var eisini pápan, ið hann avloysti sum urguleikari bert 13 ára gamal, tí hesin, ið arbeiddi sum rørleggjari, var komin til skaða í einum fingri.

– Eg var byrjaður at spæla orgul soleiðis spakuliga longu sum seks ára gamal, og tá eg var 13 ára gamal, kundu eg loysa av á orgulbeinkinum í kirkjuni, greiðir Sigmund frá.

Síðani tá hevur hann verið fastur urguleikari við kirkjuna, men tey seinnu árini hevur verið neyðugt við avloysarum. Og her hava nógvir mans roynt seg.

Millum hesar kunnu nevnast Marner Gaard og Harald Petersen sum býr í Klaksvík, sum tað hevur verið neyðugt at heita á við ávísum millumbilum.

– Eg sigli úti við eini skipan, har eg eri 10 vikur burturi og 10 vikur heima. Og tá eg so eri burtur, plagar Petur Martin Johannesen úr Klaksvík at spæla her í kirkjuni.

> **Eftirhondini kenni eg teir flestu sálmarnar og tey flestu løgini. Men sjálvandi, er altíð gott líka at taka teir fram einaferð aftrat**

## Syngja væl við

Uppgávan hjá urguleikaranum er sjálvandi at leiða sálmasangin, men ein onnur uppgáva er eisini at spæla præludium og postludium.

– Eg royni onkutíð at finna onnur løg til sálmarnar, men tað er kanska longri ímillum nú. Hinvegin royni eg at hava okkurt nýtt præludium til gudstænasturnar, vísir Sigmund á.

Trupulleiki hansara, um ein kann siga tað so, er at møguleikarnir at venja umborð á skipi eru ikki til. Tí gongur rættiliga long tíð ímillum, har hann ikki fær vant.

– Men tá eg eri heima, tá spæli eg nógv – ofta fleiri tímar um dagin, vísir hann á.

Sigmund kann tó fegnast um, at kirkjufólkið í Oyndarfirði syngur væl við til gudstænastuna.

– Er nógv fólk í kirkju, so gongur sálmasongurin sera væl.

snorri@sosialurin.fo